# Óskilið í Havn hóttir fólkaræðið

**– Tað er fullkomiliga meiningsleyst, at tú ikki skalt tora at leggja teg at sova eftir eitt býráðsval, tí so er stórur vandi fyri, at tú endan uttanfyri ávirkan. Tann frægasta loysin hevði verið, um partarnir tóku hvønn annan í eið, og broyttu siðvenjuna, tí heldur hetta óskil fram, missir borgarin fullkomiliga álitið á politikarunum og virðingina fyri demokratinum, heldur samfelagsfrøðingurin Jógvan Mørkøre**

BÝRÁÐSÓSKIL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Óvirðiligt og ósømiligt. Hesi bæði orðini lýsa væl ódámliga glantrileikin, sum vit vóru áskoðarar til í farnu viku, tá Tórshavnar býráð skuldi skipa seg. Tú visti hvørki um tú skuldi gráta ella flenna, tí bæði láturligi og grátiligi sjónleikurin í Havn tóktist ongan enda at fáa. Tað má nærum vera heimsmet, at fýra ymisk samgonguskjøl verða undirskrivað upp á tvey døgn.

Sjónleikurin í farnu viku er ikki hin fyrsti av sínum slagi. Tað tykist nærum vera ein fastur táttur í samband við býráðsval í høvuðstaðnum seinnu árini, at borgarin verður hildin fyri gjøldur av valdu býráðsumboðunum.

Samfelagsfrøðingurin, Jógvan Mørkøre, heldur, at nú er tíðin komin til at saðla um, og at virka fyri at samráðingartilgongdin verður meira skipað í framtíðini. Hann mælir til, at vit ganga burtur frá at býta bý- og bygdarráðini í meir- og minniluta.



*– Ein møguleiki er at broyta skipanina við lóg, men tann frægasta loysin hevði verið, um partarnir tóku hvønn annan í eið, og broyttu siðvenjuna, tí heldur hetta óskil fram, missir borgarin fullkomiliga álitið á politikarunum og virðingina fyri demokratinum, heldur Jógvan Mørkøre, samfelags frøðingur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Talar fyri semju

– Eftir óskilið í Havn hesaferð má lærdómurin vera, at verandi skipan ella siðvenja dugir snøgt sagt ikki. Tað, sum fór fram, var snøgt sagt ódámligt, og uttan mun um tú gjørdist vinnari ella tapari í politiska spælinum, so má niðurstøðan vera hon, at vit eiga sleppa frá hesum óskilinum, tí hvørki politikararnir ella vit borgarar kunnu liva við hesum.

Samfelagsfrøðingurin, Jógvan Mørkøre, heldur lítið um eftirspælið, sum kommunuvalið í Havn fekk. Hann heldur, at tíðin er komin til eina meira semjusøkjandi politikk, sum skal tryggja at samráðingartilgongdin kemur í fastari karmar. Samfelagsfrøðingurin metir, at vit koma best glantrileikunum til lívs við at ganga burtur frá at býta bý- og bygdarráðini upp í meir- og minnilutar.

– Í summum førum gevur tað snøgt sagt onga meining at býta upp í meir- og minnuluta, og sundurbýtingin er eisini skaðilig fyri demokratiið. Dialogur er avgerandi fyri demokratiið, og við at býta upp í meiri- og minnilutar drepur tú dialogin, og harvið eisini kjarnina í demokratinum. Tað kann ikki vera rætt, at helvtin av borgarunum ikki sleppur til orðanna gjøgnum tey umboð, tey hava valt. Tað er ikki rímiligt fyri demokratiið, heldur Jógvan Mørkøre.

Samfelagsfrøðingurin leggur afturat, at hjá teimum, sum hava latið seg valt, men sum meira ella minni av tilvild enda í andstøðu, er tað lítið hugaligt at vera vald at tala, men uttan at nakar lurtar eftir, meirilutin hevur frammanundan tikið avgerðina.

Hann nevnir møguleikan fyri at hava eina framtíðarskipan, har tann størsti listin altíð fær borgarstjórasessin, og síðan verða nevdarsessirnir býttir eftir sama leisti, sum nevndarsessirnir í løgtinginum verða sundurbýttir.

– Tað er kortini einki, sum forðar meirilutanum í at taka allar formanssessirnar í løgtinginum, so henda tilvísing kann bert galda partvís. Tað avgerandi er, at meirilutin virðir minnilutan so frægt, helst so, at tað ikki verður kílað sundur, so allar listar fáa formanssessir.

– Tað er fullkomiliga meiningsleyst, at tú ikki skalt tora at leggja teg at sova eftir eitt býráðsval, tí so er stórur vandi fyri, at tú endan uttanfyri ávirkan. Ein møguleiki er at broyta skipanina við lóg, men tann frægasta loysin hevði verið, um partarnir tóku hvønn annan í eið, og broyttu siðvenjuna, tí heldur hetta óskil fram, missir borgarin fullkomiliga álitið á politikarunum og virðingina fyri demokratinum, vísir Jógvan Mørkøre á.

## Positiv rák

Hóast rokið um býráðsmeirlutan í høvuðsstaðnum fekk stóra rúmd í fjølmiðlunum, so heldur Jógvan Mørkøre, at tað sanniliga eisini eru positiv tekin at hóma eftir kommunuvalið seinasta týsdag. Hann vísir á, at til dømis á Tvøroyri, Fuglafirði og í Sundalagnum er ein skilagóð siðvenja við at taka seg upp, sum aðrar kommunur kundu lært av, og vísir til breiðu semjurnar í hesum kommunum, har øll kommunalu umboðini sleppa til orðanna.

– Á Tvøroyri hevur verið at hoyrt, at býráðsvalið hesaferð møguliga var tað seinasta, har tað varð stillað upp flokspolitiskt. Í Sundalagnum og Fuglafirði er tankagongdin við at hava breiðar semjur í býráðnum við at gera um seg, og tað haldi eg er ein ógvuliga sunn gongd, heldur Jógvan Mørkøre.

## Burtur við flokkunum

– Politisku flokkarnir í Føroyum eru stovnaðir eftir landspolitiskum endamálum og hava sum er einki sum helst við lokalpolitikk at gera. Hvørki loysing/ samband ella høgra/vinstra spurningarnir eru í dag at finna innan lokalpolitikk, og tí er tað ikki rætt, at flokkarnir stilla upp til kommunuval, uttan so, at teir miðvíst brúka flokkin til at menna politikk á hesum øki.

Jógvan Mørkøre er sannførdur um, at vit eiga at hyggja burtur frá at floksuppstilling á kommunuvalum í framtíðini. Hann vísir á, at valupplegginigini hjá flestu valevnunum til kommunuval hava einki samband við stevnuskráirnar hjá politisku flokkarnar, meðan tað hinvegin fyrst og fremst eru persónligu hjartamálini hjá valevnunum, sum valevnini royna at selja seg við.

– Skulu vit hava listar, sum stilla upp til kommunuval. er neyðugt hjá okkum borgarum at vita, hvat listarnir standa fyri. Sum støðan er í løtuni ber bara til at krøkja persónarnar á listunum upp á, hvat teir hava lovað og ikki listarnar, tí eingin veit, hvat listarnir standa fyri, sigur samfelagsfrøðingurin.



# Hvør vann Tippið 13 hjá Føroya Studentaskúla?

## Ongin 13 røtt!

Tíverri var ongin av 544, sum sendu inn, sum hevði so sterkt politiskt tev, at hann megnaði at manna Tórshavnar Býráð frammanundan og vinna stóra vinningin vikuskiftisferð fyri 2 við Atlantic Airways til Keypmannahavnar.

10 høvdu 12 røtt! Kortini var um reppið hjá nøkrum at vinna stóra vinningin frá Atlantic Airways, tí ímóti flestu meiningum vóru ikki færri enn 10 fólk, sum tippaðu 12 røtt. 81 tippaðu 11 røtt og 131 tippaðu 10 røtt. Sostatt vóru 222, sum vóru við í lutakastinum um vinning 2 og 3.

## Men hvør lumpaði tey 10?

Av teimum 10, sum tippaðu 12 røtt, var
*ein sum valdi Torfinn Smith í staðin fyri Sjúrð Olsen,*
*6 sum valdu Jenis av Rana í staðin fyri Marin Katrinu Frýdal,*
*3 sum valdu Torfinn Smith í staðin fyri Marin Katrinu Frýdal.*

Sostatt vóru tað Marin Katrina Frýdal og Sjúrður Olsen, ið lumpaðu tey 10.

Anna Djurhuus, skrivstovukvinna, skipaði fyri dráttinum og Mads Winther, rektari, dró. Baldur og Sólja av Skarði, Tórshavn, vunnu vinning 2, ein Beko-dustsúgvara frá Damor. Elisabeth Rasmussen, Tórshavn, vann vinning 3, leskiligt jólaborð fyri 2 við kaffi frá Hotel Hafnia. 2.ð ynskir teimum til lukku og takkar hjartaliga øllum, sum luttóku og gjørdu kappingina so spennandi. 2.ð takkar eisini Atlantic Airways, Damor og Hotel Hafnia fyri dyggan stuðul.

## Royn teg í rokning

*Sí myndina til høgru*

Henda rokniuppgáva varð gjørd á skúlanum í sambandi við tippingina:

1) Tú skalt velja 13 býráðslimir ímillum tey 76 valevnini.
   Hvussu nógvar valmøguleikar hevur tú?
2) Tá ið tú skalt meta um, hvørjir teir 13 komandi býráðslimirnir verða, kann tað gerast á ymsan hátt, t.d.:
   a) Tú heldur teg við vissu kunna nevna t.d. 10 av komandi býráðslimum, síðan skalt tú velja 3 ímillum restina av teim 66 uppstillaðu.
      Hvussu nógvar valmøguleikar hevur tú tá?
   b) Tú heldur teg við vissu kunna siga, hvussu býtið ímillum flokkarnar verður, t.d. A: 3, B: 3, C: 3 og E: 4.
      Eisini heldur tú teg við vissu kunna nevna t.d. 2 av komandi býráðslimum úr hvørjum av hesum 4 flokkum.
      Hvussu nógvar valmøguleikar hevur tú tá at velja teir 5 býráðslimirnar, ið eftir eru at velja?

Lesið meira á næstu síðu

## Tippaði 13!

Í mesta lagi kunnu 13 krossar setast, tí 13 býráðslimir skulu veljast. Vinnararnir verða lýstir í bløðunum.

1. vinningur: *Vikuskiftistúrur við Atlantic Airways til Keypmannahavnar. Drigið verður millum 13 røtt.*
2. vinningur: *Beko-dustsúgvari frá Damor, 1400W, virði kr. 998,-. Drigið verður millum 10 til 13 røtt.*
3. vinningur: *Leskiligt jólaborð fyri 2 við kaffi frá Hotel Hafnia. Drigið verður millum 10 til 13 røtt.*

F lkaflokkurin:
- Jan Christiansen
- Inga Dahl
- Tommy N s Djurhuus
- Maria Dul
- Tummas Gar i
- Erna H berg
- Hj¿rleif Hjaltalir
- Vagnur Johannesen
- Eyfinn Lenvig
- Heini Magnussen
- Bjarti Mohr
- Terji Nielsen
- Annika Olsen
- Sj r ur Olsen
- P ll Petersen
- J gvan Thomsen
- Egon flregaard

Sambandsflokkurin:
- Heðin Mortensen
- Høgni Mikkelsen
- Beate L. Samuelsen
- Annfinn Brekkstein
- Bjørg Dam
- Steinfinnur Mittelstein
- Karina Fagralón
- Bent Jákup H. Hansen
- Rasmus A. Joensen
- Hans Albert Hansen
- Edvard Olsen
- Jóhan Petur Johannesen
- Bjarti Thomsen

Javnaðarflokkurin:
- Poula Apol
- Katrin Dahl Jakobsen
- Bjørg Joensen
- Gunnvør Joensen
- Elin Lindenskov
- Meta C. Palle
- Anna Maria Persson
- Jan Poulsen
- Halla Samuelsen
- Hans Jákup Simonsen
- Torfinn Smith
- Chr.Robert Vilhelmsen
- Jói Winther

Sjálvstýrisflokkurin:
- Carl August Arge
- Ingeborg A. Godtfred
- Jónas Johnson
- Noomi S. Júliússon
- Klæmint Olsen
- Tórbjørn Poulsen
- Øssur Simonsen
- Jóhan Marni Stenberg

Tjóð-veldisflokkurin:
- Kári Árting
- Jógvan Arge
- Tórhallur Áslaksson
- Laufey Blaasvær
- Martin Dam
- Hildur Eyðunsdóttir
- Marin Katrina Frýdal
- Leivur Hansen
- Maud Wang Hansen
- Marianna Heinesen
- Ísak N. Jacobsen
- Georg Kjærbo
- Rubæk Lilaa
- Johan Mortensen
- Birgir Sondum

Miðflokkurin:
- Sámal í Gong
- Svenhild Haraldsen
- Egin Henriksen
- Allan Hjaltalin
- Frank Jacobsen
- Charlotta á Váli Olsen
- Dánjal Petersen
- Jenis av Rana
- Marnar á Skúr
- Elin N. W. Tausen

## Royn teg í rokning!

***Rokna nú fyrst! Kanna so eftir á síðu 39, um tú hevur úrslitið rætt***




Leiðari til Serstovnadeildina

Kanst tú leiða eitt sterkt lið

Tú ert áhugaður í korunum hjá menningartarnaðum í Føroyum. Tú hevur visjónir og evnini at leiða eitt sterkt lið av leiðarum. Tær dámar at bróta upp úr nýggjum, og tú megnar at gjøgnumføra broytingar

Ljóðar hetta sum tú? So er starvið sum leiðari fyri Serstovnadeildina kanska nakað fyri teg. Serforsorgarøkið stendur fyri broytingum, bæði á fakliga og fyrisitingarliga økinum, og tað krevur eitt gløgt høvd, analytisk evni og gott yvirlit.

Serstovnadeildin er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Hon fevnir um bústovnar, sambýli, verkstaðir og virknistilboð til vaksin menningartarnað. Virksemið er kring alt landið, og leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum fyri Heimarøktini og Serforsorgini.

Serstovnadeildin umsitur fyri 80 milliónir krónur árliga, og tær fara til at reka 26 stovnar. 209 starvsfólk starvast í serforsorgini, og leiðarin fyri serstovnadeildina arbeiðir í tøttum samstarvi við 24 stovnsleiðarar, sum bygnaðarliga eru undir honum. Umframt Serstovnadeildina eru fýra aðrar deildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Serstovnadeildin skal broytast og bygnaðurin betrast. Leiðarin má tískil hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skalt vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan samstarv við onnur.

Serstovnadeildin er eitt dynamiskt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins. Økið hevur stóran almennan áhuga, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanin setir. Tú fært ávirkan, kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og starvsroyndir. Lønin hevur verið flokkað á 49. stigi í lønaravtaluni hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknarfreistin er mánadagin 22. november 2004, og starvið verður sett sum skjótast. Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010

www.sansir.fo